SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 1820

Blaðstjóri:
Torfinn Smith

Bert eg sleppi til Havnar

TAÐ kann vera nokk so stuttligt viðhvørt at lesa Fjúrtanda, eitt nú Finnboga Isaksen, bæði tá hann nevnir seg við kristna navni sínum ella tá hann er Lossingarmaður, Norðoyingur ella bert okkurt annað dulnevni. Hann tosar um sentralisering, um at bera so í band at ikki allir Føroyingar gera sum hann og flyta til Havnar, tí so verður meiri trongligt hjá honum, ella um skúlaskapin, sum ikki gevur tað hann skal.

ALT hetta hansara tos kenna vit so sera væl. Hetta er fyri stóran part uppafturtøka av tí, sum so mangan er hildið fram, ikki minst í teimum árunum, tá hansara menn sótu í Tinganesi og tosaðu um at sentrali-sera so nógv sum gjørligt og fyribyrgja at nakað sum helst var gjørt, soleiðis at smábygdirnar framvegis kundu trívast. Hvørjir vóru størri mótstøðumenn móti útbyggingini av samferðsluni enn júst hansara egnu menn?

HETTA at føra fólk í teymum og leiða tey tær leiðir einum sjálvum lystir er lættari sagt enn gjørt. Finnbogi heldur, at skúlin skal skipast soleiðis, at vit til einahvørja tíð skulu kunna broyta hann við tí endamáli, at hvør einasti Føroyingur má kontrollerast, soleiðis at hann sleppur ikki út av landinum, tí tað sigur Finnbogi er landaskaði. Hann skal læsast inni, gerast eitt amboð fyri hinari stóru nasjonalismuni, tí tá gerst hann sannur Føroyingur. Hann skal haldast úti á smáplássunum og tyggja tað, sum har er at tyggja. Hann skal ikki hava høvi til at vinna pening, hann skal liva av tí, sum har er at fáa av føði. Pening má hann ikki fáa um hendur, tí tað skal Finnbogi og aðrir, sum búgva í Havn hava fyri seg.

VIT skulu ikki sentralisera, sigur Finnbogi, vit skulu royna at hava Føroyar sum tær eru, hava verið og vónandi fara at verða, tí tá verður lættari at dríva politikk hjá Finnboga og hansara líkum, tí tá er nógv lættari at halda misnøgdina uppi.

Beinleiðis frá Japan

Kassette bandupptakarar



Upptøka frá mikrofon ella beinleiðis frá radio. Við tasku og mikrofon *kr. 495,-.*

Vælegnaður heima, í bili, í báti, til skúlabrúk.

Har SEV er, kann hann brúkast beinleiðis frá ljósneti.

RADIO-EL Tlf. 1397 — Tórshavn

RADIOBÚÐIN Tlf. 7008 — Runavík

Skiparar og radiotelegrafistar

Skeið byrja 1. oktober. Nærri við at venda sær til

KLAKKSVÍKAR SJÓMANNSSKÚLA

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Sosialistiskt ting í Havn

Felagið Oyggjaframi — Føroyskir Sosialistar, sum síðan 1962 hevur virkað við høvuðsdeild í Keypmannahavn, og sum millum annað hevur givið út tíðarritið FRAMAN, hevur nú havt deild í Føroyum næstan eitt ár. Felagið hevur í løtuni tvær javntstillaðar deildir og hevur í umbúnað at seta á stovn fleiri deildir ymsastaðni í landinum.

Í døgunum 6., 9. og 10. august hevði felagið fyrsta ting sítt í Havn. Á tinginum vóru fyrilestrar, orðaskifti, framlogur og atkvøðugreiðslur um lógir, stevnu og framtíðarstarv felagsins.

Rolf Guttesen helt demografiskan fyrilestur um fólkaflytingina úr Føroyum, D. P. Danielsen um sosialistiskan politikk í Føroyum, Hanus við Høgadalsá um sjálvstýrispolitikk, André Niclasen og Tórður Jóansson um tørvin og líkindini hjá sosialismuni í Føroyum og Eydun Johannesen um mentapolitikk. Aftan á vóru saklig orðaskifti um evnini við serligum denti á aktuellu støðuna í landinum.

Sunnudagin var orðaskifti og samtykt av viðløgdu yvirlýsing.

Tingið endaði við at talað varð um stovnseting av Sosialistiskum Landsfelagsskapi SLF.

Yvirlýsing

I.

Í árinum 1969 er føroyska samfelagið soleiðis fyrikomið, at hækkandi tal av fólki (35 pst. av burðaravlopinum) rýmir av landinum.

Fólk rýma, tí samfelagið hevur einki arbeiði at geva teimum — helst konufólkunum. Tann skattur, sum nú verður kravdur av fólki við vanligari inntøku, ger sítt til at fólk flýggja. Høgur tollur og meirvirðisgjald á øllum vørum og versnandi bústaðarviðurskifti gera tað, at tað verður meira og meira óliviligt í Føroyum hjá tí stóra partinum av fólkinum, hóast »góðar tíðir« skulu eitast at vera.

Bratt hækkandi útlendskur rakstrarstuðul ber prógv um, at samfelagið er sjúkt.

Í Føroyum eru tvey sløg av fólki: tey, sum fáa føroyska løn, og tey, sum fáa nógv hægri danska løn. Hesin lønarmunur, ið er óhugsandi í einum vælskipaðum samfelag, verður sum frá liður ótolandi hjá teimum arbeiðandi.

Seinasta fiskimannaverkfallið sýndi, at tá fiskimenn royna at bøta um kor síni, fáa teir litla ábót, sum teir straks noyðast at rinda 3-falt aftur í skatti og tolli.

Umframt tey høgtløntu liðir samfelagið av einum vaksandi heri av snultarum, sum hóast teir hvørki arbeiða ella lata skatta liva í yvirflóð.

Heimasýrislógin hevur ikki givið fólkinum meira sjálvstýri. Útlendska valdið er ikki minkað, men vaksið. Ímóti føroyskum vilja eru vit innlimaðir í friðarhóttandi hersamgongu, og hóast øll mótmæli er imperialistisk herstøð sett upp í landinum.

II.

Tvær royndir eru gjørdar til at gera fólksgagnliga rørslu millum føroyingar. Javnaðarflokkur in var stovnaður í 1926 og var leingi amboð hjá teimum minni mentu í stríðnum fyri betri livikorum. Eftir annan heimsbardaga gjørdist Javnaðarflokkurin amboð hjá ríkismyndugleikunum í stríði teirra móti sjálvbjargnisrørsluni; hann hjálpti útlendingum við at troka herstøðir inn á okkum, og nú er tað hann, sum stílar fyri tí skatta- og tollapolitikki, sum rakar tey minni mentu meinast. Stórur partur av hesum peningi fer beinleiðis til reiðarar og aðrar kaptalistar. Ein annar partur fer til berghol og aðrar »ílogur«, sum ofta ikki tæna øðrum endamálum enn atkvøðu fiskiskapi.

Tjóðveldisflokkurin varð stovnaður í 1948. Í 1950'unum vann hann sær álit millum fiskimenn og onnur arbeiðandi og fórdi tjóðargagnligan og fólksgagnligan politikk. Eftir løgtingsvalið í 1962 gjørdi flokkurin samgongu við tríggjar aðrar sonevndar sjálvstýrisflokkar — á ongum grundarlagi.

Síðan Tjóðveldisflokkurin slepti síni demokratisku, anti, kapitalistisku stevnu, er hann minkaður og viknaður. Eftir hjá honum er nú bara opportunisma.

III.

Vit halda, at teir torgreiddu spurningar, sum kapitalistiska samfelagsskipanin reisir burturi og heima, einans kunnu loysast við umbroyting til sosialistiska samfelagsskipan.

Felagsskapur okkara setir sær sosialistiska samfelagið sum mið. Í arbeiðnum fram móti hesi hægru og meira rættvísu samfelagsskipan vilja vit sameina øll arbeiðandi. Vit vilja virka fyri, at samfelagið gevur øllum limum sínum arbeiði, avtekur lønarmun á monnum og kvinnum og letur teimum arbeiðandi alla úrtøkuna av arbeiði teirra. Vit vilja avtaka teir stóru lønarmunir, sum nú eru. Vit vilja virka fyri kooperativum fyritøkum, og at samfelagið yvirtekur tær handils- og vinnulivsfyritøkur, sum økonomiska yvirstættin nú fær vinningin av. Vit krevja, at búskaparlig heildarætlan verður gjørd, so fólk sleppa undan tí fyrilitsleysa oyðslinum við fólksins peningi, sum nú er. Tað er neyðugt, at fakfelagsrørslan verður styrkt, so at hon gevur teimum arbeiðandi vald á sínum egnu viðurskiftum.

Okkara landspolitiska endamál er at frígera Føroyar úr øllum imperialistiskum bondum. Ræðið yvir Føroyum eigur ikki at vera hjá nøkrum øðrum enn hjá teimum, sum arbeiða her í landinum.

Vit vilja gera allar føroyingar kunnugar við ta vísindaligu sosialistisku skrá, sum vit byggja á marxistiskum grundarlagi. Tað er sannføring okkara, at hesin kunnleiki fær allar arbeiðandi føroyingar at ganga saman um okkara politiska endamál, sum er føroyskt sosialistiskt tjóðveldi.

Tórshavn, 10. august 1969.

OYGGJAFRAMI
Føroyskir Sosialistar.

Dagbókin

BRÚDLEYP

Leygardagin 16. august giftast í Havnar kirkju Jórun Borgarlið úr Havn og Hans Jørgensen úr Miðvági. Brúdleypsadr.: Havnar Klubbi.

52 ÁR Í STARVI

Jógvan Skylindal, telefonmeistari fer úr starvi sínum vegna aldur 1. september í ár. Tá hev ur hann í samfull 52 ár starvast hjá Telefonverki Føroya Løgtings. Á 50 ára starvsdegi sínum fekk hann kongsins »Fortjenstmedalje« í silvuri.

KOMMUNULÆKNAR

Starvið sum kommunulækni í Sandoynni er nú aftur lýst leyst í læknatíðarritinum og verður embætið at seta 15. september í ár — um umsøkjarar eru. Tað hevur sum kunnugt gingið sera striltið at fáa læknar í øll embætir og hava tí fleiri læknadømir verið røkt av ymiskum vikarum í styttri tíðarbilum.

Somuleiðis er eisini embætið sum kommunulækni í sunnara helmingi í Suðuroy lýst leyst at seta frá 1. oktober í ár.

Ætlanin er, at í heyst skal fara fram ein serlig propaganda fyri føroyskari sølu av salt- og klipp fiski í Italiu.

SUNNUDAGSSKÚLIN VIÐ HOYVÍKSTJØRN

byrjar aftur aftaná summarfrítiðina nú sunnudagin 17. august kl. 10½. Øll børn eru hjartaliga velkomin. Søgur í hópatali, sangur, fósbiløt o. m. a.

Telefondama

Á telegrafstøðini er pláss leyst fyri einari telefondamu. Realprógv ella annað samsvarandi prógv er neyðugt.

Skrivlig umsókn við avriti av eksamensprógvi verður at senda telegrafstøðini.

E. AKRABERG HANSEN